# Ilt er at spáa

ATLANTIC AIRWAYS

Ilt er at spáa – serliga um framtíðina, segði Storm P. Men tað er júst tað sum vit vilja hava okkara lesarar at gera.

Hvussu síggja Føroyar og umheimurin út 1. desember 2004? Við at svara teimum 20 spurningunum niðanfyri soleiðis sum tú væntar at støðan verður hendan dagin, hevur tú møguleika at vinna eina vikuskiftisferð fyri tvey til Keypmannahavnar við Atlantic Airways.

Vinnarin av ferðini verður tann, sum hevur svarað flestum spurningum rætt, tá vit 1. desember 2004 kl. 12:00 fara at telja saman og samanbera við táverandi nútíðina. Stendur á jøvnum millum fleiri luttakarar, verður vinnarin funnin við lutakasti millum hesar.

Svara spurningunum, klipp hesa síðuna úr blaðnum, og send okkum hana í seinasta lagi 31. desember 2003. So ert tú við í kappingini.

Sosialurin

## Spurningarnir eru…

| | | |
|---|---|---|
| Í ár tók 35 ára gamli Fríðrikkur krúnprinsur endiliga eina avgerð um at gifta seg. Tann hepna gjørdist tann 31 ára gamla tasmanska Mary Elisabeth Donaldson. Giftarmálið skal standa 14. mai komandi ár, og spurningurin er so: | Hevur kongshúsið innan 1. desember 2004 kunngjørt, at Mary Donaldson er við barn ? | JA / NEI |
| Blaðið, sum sambært egnari útsøgn skuldi vera rugbreyðið í føroyska blaðheiminum, líkist eftirhondini mest rundstykkinum í sama – lætt sum ein fjøður og fult av luft. Valið kann gera enda á tíðini við Tjóðveldisflokkinum í samgongu, og spurningurin er so: | Koma Fregnir framvegis út 1. desember 2004 ? | JA / NEI |
| Føroyska fótbóltslandsliðið fekk við bit og slit bert skavað sær 1 einsamalt stig saman undir allari EM-undankappingini. Onkur segði liðið vera óheppið, onnur halda at liðið snøgt sagt var verri enn øll hini. Komandi ár fer landsliðið at royna seg í HM-undankappingini. Spurningurin er so: | Hava Føroyar fingið nakað stig higartil í HM-undankappingini, tá kalendarin sigur 1. desember 2004? | JA / NEI |
| Meðan nýggja Norrøna síðan summarsiglingina mest av øllum hevur verið brúkt til at sigla sína egnu manning í land við, hevur gamla Norrøna fleiri ferðir verið á fríggjaraferð millum keyparar. Men enn hevur ikki eydnast at selt gomlu danguna. Spurningurin er so: | Er gamla Norrøna seld 1. desember 2004 ? | JA / NEI |
| Eitt annað skip, sum skjótt fær heitið "gamli" sett á seg, er Smyril. Hvussu skjótt hetta hendir veldst bæði um hvussu gongst at banka pláturnar saman til nýggja Smyril og hvussu gongst at banka Skipara- og Navigatørfelagið til at lata yvirmenn sleppa umborð á nýggju suðuroyarferjuna. Spurningurin er tí: | Er nýggi Smyril farin í sigling 1. desember 2004 ? | JA / NEI |
| Og nú vit eru á sunnastu oynni, har herrópið "Ein oyggj eitt folk" hevur verið at hoyrt í seinastuni, alt meðan bygdaklandurin millum teir báðar býirnar í oynni heldur fram, er spurningurin: | Er avgjørt at Suðuroyggin skal vera ein kommuna ? | JA / NEI |
| Sjálvstýrisflokkurin fær neyvan sínar tinglimir úr sunnara parti av Føroyum. Tað er, um hann yvirhøvur fær nakran tinglim við komandi val. Tí spurningurin er: | Verður Sjálvstýrisflokkurin umboðaður á tingi 1. desember 2004 ? | JA / NEI |
| Tað er ósannlíkt at tað verður Sjálvstýrisflokkurin. Men spurningurin er: | Hvør gjørdist størsti flokkur á valinum 20. januar 2004 ? | Sambandsflokkurin / Fólkaflokkurin / Javnaðarflokkurin / Tjóðveldisflokkurin / Ein annar flokkur |
| Fyri nú at sleppa føroyska politikkinum eina løtu til frama fyri meira viðkomandi mál, kunnu vit tríva í Big Brother, har føroyska Sissal gjørdist við barn fyri opnum skermi. Tí stóð Robert sum øllum kunnugt fyri. Spurningurin er so: | Eru Sissal og Robert gift 1. desember 2004 ? | JA / NEI |
| Beint nú hava vit ongan, tí tann vit høvdu, hevði snýtt - hóast tað ikki var nakað nýtt. Men onkur má vera hóast tað kann vera torført at finna ein, hvørs seinastu 25 ár eru rein. Spurningurin er tí: | Hvør er Føroya løgmaður 1. desember 2004 ? | Lisbeth L. Petersen / Jóannes Eidesgaard / Anfinn Kallsberg / Høgni Hoydal / Onkur annar |
| Kommunuval verður komandi ár, og tað hevur seinastu nógvu árini havt eitt borgarstjóraskifti við sær í landsins størstu kommunu. Spurningurin er tí: | Er Jan Christiansen borgarstjóri í Tórshavnar kommunu 1. desember 2004 ? | JA / NEI |
| Tá sita tey kongaliga væl sterkari í sínum sessi. Og nú republikkin bleiv av ongum í fyrstu syftu, kunnu føroyingar enn verða útsettir fyri at fáa vitjan av sínum egna monarki. Spurningurin er so: | Kemur Margeta drotning til Føroya innan 1. desember 2004 ? | JA / NEI |
| Drotningin vitjar ikki so ofta sum danski forsætisráðharrin, ið næstan er komin undir illgruna fyri at dáma væl í Føroyum. Tí er spurningurin ikki um, men heldur: | Hvussu ofta hevur Anders Fogh Rasmussen verið í Føroyum frá 1. januar til 1. desember 2004 ? | Onga ferð / Eina ferð / Tvær ferðir / Fleiri enn tvær ferðir |
| Hann skuldi finnast í Havn í ár, men kappingin er sum altíð opin frá byrjan. Tí er spurningurin: | Hvør verður Føroyarmeistari í 1. deildarfótbólti kappingarárið 2004 ? | HB / B36 / KÍ / NSÍ / Okkurt annað lið |
| Tað var við dintlinum í vatnskorpuni at skálamenn tryggjaðu sær enn eitt ár í bestu deildini. Spurningurin er bara: | Er Skála framvegis í 1. deild 1. desember 2004 ? | JA / NEI |
| So fingu teir Saddam. Men hin av teimum báðum mest eftirspurdu monnunum í heiminum spælir framvegis krógva og blunda við amerikumenn. Spurningurin er: | Er Osama bin Laden handtikin innan 1. desember 2004 ? | JA / NEI |
| Tað er ikki hansara skyld at vit ikki fingu meira enn eitt stig í EM-undankappingini, men hann hevur kortini verið nevndur í tíðindunum sum ein maður, ið leitar sær eftir nýggjum starvi. Spurningurin er tí: | Er Henrik Larsen framvegis føroyskur landsliðsvenjari 1. desember 2004 ? | JA / NEI |

Klipp hesa síðuna út, og send okkum hana á Postboks 76, 110 Tórshavn. So ert tú við í kappingini um eina vikuskiftisferð fyri tvey til Keypmannahavnar.




Fáið meira burturúr

við okkara fiskiútgerð

*Vit ynskja viðskiftafólkum okkara*

*eini gleðilig jól og eitt gott nýggjár*

VAKI DNG

Umboð fyri VAKI-DNG: Fa. Jóannes F. Dahl, Maskinsmiður, Tlf: +298 422 274, Fax: +298 422 189, Mobil: +298 221 000, dam-dahl@post.olivant.fo, 460 Norðskála, Føroyar

Akralind 4 • IS-200 Kópavogur • Ísland

www.vaki.is

HÉR & NÚ / SÍA



Vit ynskja viðskiftafólki okkara eini gleðilig jól og eitt gott nýggjár

HOTEL VÁGAR

RIO BRAVO RESTAURANT

team85



VIT YNSKJA ØLLUM VIÐSKIFTAFÓLKUM EINI GLEÐILIG JÓL OG EITT GOTT NÝGGJÁR



J. R - Lastvognar

VIT GERA TUNGT ARBEIÐI LÆTTARI

Føroya Bjór

*Vit ynskja øllum okkara viðskiftafólkið eini gleðilig jól*

